TB-EB/Streymur 3-0 (1-0):

# Hýrurin í topp á Sevmýri

**EB/Streymur hevði fingið skeiva beinið úr seingini, og teir megnaðu ongantíð at spæla seg til opnar møguleikar á Sevmýri, har heimaliðið væl megnaði at halda seg til tað, teir frammanundan høvdu avrátt**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tvørámenn hava fyri fyrstu ferð síðani uppflytingina fingið fulla úrtøku. Og avrikið sunnudagin boðaði frá, at eingin nýtist at vera kløkkur, um TB fleiri ferðir afturat fer at gera av við mótstøðuliðini, sum vitja á Sevmýri.

Hagtølini á heimavølli higartil geva greiða ábending um, hvør stóra TB styrkin er.

Predrag Markovic tykist vera sannur brandur millum stólparnar, og teir fýra í aftasta røð - Zivkovic, Aca, Óli og Jon – vita, hvat tað snýr seg um. Teir hava royndirnar, teir hava bóltførleikan, og teir eru tilvitaðir um, hvussu liðið skal stýrast.

Higartil hevur tað eydnast serliga væl á heimavølli. B36, sum nú er oddalið, fekk einki mál ímóti teimum, og sunnudagin fóru teir í EB/Streymi norður aftur við ongum. Teir fingu einki stig, teir fingu einki mál, og tað var um at gera, at teir høvdu nakra rættuliga roynd móti málinum hjá TB.

Fyrstu løtuna tóktist tað sum um, at gestirnir hesa ferð vóru grammari, enn B36 gestirnir vóru fyri fjúrtan døgum síðani. Sonni og Sorin vóru skjótir, meðan tað tóktist meiri torført hjá teimum á miðvøllinum at varðveita bóltin millum sín, so tað ikki skuldi vera so stressað.

Hans Pauli Samuelsen hevði skotroynd dygst framvið, og í øðrum førum var tað ikki so langt frá, at opnir møguleikar spurdist burturúr, tá ið støðan framvegis var 0-0.

TB venjarin tykist hava gott á sínum monnum, og teir eru ógvuliga tilvitaðir um konseptið. Tá ið mótstøðumenninir hava bóltin, eru teir skjótir at leggja seg aftur, og tað er stutt millum menninar og keturnar, og tá ið TB hevur bóltin, royna teir at varðveita sum longst.

### Avgerðin

Hjá TB var tað dyggur smeitur, tá ið miðvallarin Daniel Nyarko noyddist av vøllinum, tá ið ein stórur hálvur tími var farin. Men dygst undan steðginum fingu teir málið, sum vísti seg at hava avgerandi týdning.

Óli Johannesen, sum tykist vera ógvuliga væl fyri í ár, skoraði, eftir deyðbóltsstøðu. Olivur Abrahamsen taklaði eftir aftur og fram í brotsteiginum bóltin til landsliðsmannin, sum smekkaði til. TB var frammanfyri 1-0, og tað var stórur munur á sinniligu støðuni, tá ið liðini leitaðu sær í TB húsið.

Eftir steðgin bóru EB/Streyma menninir seg ikki serliga snilt at. Frá fyrstu løtu løgdu teir fýra menn fram í fremstu røð. Harvið varð tað tunnt í verjuni og eisini á miðvøllinum, og hetta legði upp til tað, sum TB heldur seg hava best tak á.

Intensiteturin hvarv, tá ið seinna umfarið var eitt korter gamalt. TB vann bóltin, tá ið EB/Streymur var á veg fram. Miðvallarin Einar Petesen legði inn um verjuna, har miðvallarin í vinstru, Olivur Abrahamsen, gjørdist leysur innanfyri verjuna, vann kapprenningina við verjuspælararnar og setti eitt sindur inni í brotsteignum framvið Gunnari á Steig.

Fimm minuttir seinni var TB aftur upp á spæl, og aftur var tað Olivur Abrahamsen, sum var málskjútti. Í brotsteiginum hjá mótstøðumonnunum legði álopsspælarin Emmanuel Larby út frá til Olivur Abrahamsen, sum sneiddi framvið einum mótstøðumanni, áðrenn hann setti bóltin í mótstøðumálið.

EB/Streymur fall fullkomuliga saman, eftir at heimaliðið hevði skorað til 2-0 og 3-0. Olivur Abrahamsen hevði møguleikar at gera hattrikk, og Emmanuel Larby hevði fleiri møguleikar at økja um leiðsluna, sum væl kundi havt verið í tennistølunum 6-0.

Men tað kundi ikki taka sigursrúsin frá TB viðhaldsfólkunum, tá ið tey fóru av Sevmýri. Tey høvdu enn eina ferð verið vitni til, at TB í ár eigur knasandi trygga verju, og at teir hava venjara, sum megnar sera væl at fáa alt tað burturúr spælarunum, sum tað ber til.

Teir á felagsliðnum EB/Streymi ásannaðu, at hetta mundi vera eitt tað ússaligasta, sum teir hava víst ella rættari sagt ikki víst, síðani teir komu aftur í bestu deildina.



*TB vóru bæði hægstir og bestir, tá EB/Streymur vitjaði á Sevmýri sunnudagin*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

## Málslúkurin venur á Argjum

**Olivur Abrahamsen heldur, at sum tað myndaðist i 2. hálvleiki, so kundu teir havt skorað seks mál**

TB
*Jóannes Hansen*

Porkeningurin Olivur Abrahamsen gjørdist dagsins maður á Sevmýri. Dagliga sæst hann lítið á Tvøroyri. Hann gongur í tekniska skúlan í Havnini, og tað er bara fríggjakvøld og leygardag, at hann venur saman við liðfeløgunum.

- Eg venji á Argjum. Fyrrverandi TB spælarin, Oluf Mortensen, er venjari hjá okkum. Vit eru tríggir TB spælarar, og í alt eru vit 10-12 suðuroyingar. Hinir eru úr Royn og VB/Sumba.

*Tað er óneyugt at spyrja, um tú ert nøgdur við avrikið?*

- Tað kanst tú ætla, at vit eru. Inntil vit fingu fyrsta málið var talan um rættuliga tætta uppgerð, sum kundi fara báðar vegir. Men eftir at vit vóru komnir framum 2-0, var eingin ivi um, at vit vóru betri, og vit høvdu møguleikar at gera eini seks mál. Men vit kunnu væl liva við, at vit vunnu 3-0, sigur væl nøgdi Olivur Abrahamsen, sum skoraði tvey mál og átti næstsíðsta fótin á fyrsta málinum.

Daniel Nyarko noyddist av vøllinum, tá ið ein hálvur tími var farin. Hann endaði á sjúkrahúsinum. Tað tóktist sum um, at knæið var løstað, men tá ið vit frættu av Tvøroyri í gjár var ikki greitt, hvussu álvarsligur skaðin var.

## Piotr heldur hansara dummaðu seg

**EB/Streyma venjarin staðfestir, at avtalurnar í sambandi við deyðbóltarnar ikki hildu, og tað var orsøkin til týdningarmikla fyrsta málið**

EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Piotr Krakowski, venjarin hjá EB/Streymur, hevur nógvar royndir, og hann heldur lítið um avrikið, sum hansara sýndu í 2. hálvleiki.

- Avgerðin fall, tá ið teir fingu hol á. Eg haldi, at vit høvdu gott tak á í 1. hálvleiki, og vit høvdu møguleikar at gera mál. Men tá ið mótstøðumenninir hava vunnið 3-0 ber ikki til at siga annað, enn at teir loystu sína uppgávu, og tað gjørdu vit ikki.

*Í 2. hálvleiki vóru tit sera framrættaðir?*

- Tað er líka mikið, um tú tapir við einum ella tveimum málum. Teir høvdu sjey menn aftanfyri bóltin mest sum alla tíðina, og tí var torført at spæla seg til møguleikar. Vit taptu dystin upp á fyrsta málið. Vit høvdu tosað nógv um, at Óli ikki skuldi fáa møguleikan, tá ið teir høvdu horna og fríspørk inni undir málinum. Tað høvdu vit gjørt, tí vit vistu, at hetta kundi verða avgerandi. Men vit gloymdu avtalurnar í hesum eina førinum, og tað taptu vit uppá, sigur EB/Streyma venjarin, sum fer at biðja sínar gloyma henda dystin, áðrenn teir sunnudagin skulu í Gundadal at spæla ímóti HB.

### Fakta um dystin

**TB-EB/Streymur 3-0 (1-0)**
1-0: Óli Johannesen 45.
2-0: Olivur Abrahamsen 60.
3-0: Olivur Abrahamsen 65.
**TB:** Predrag Markovic — Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen — Búi Mortensen (Mortan Enni, 70.), Einar Petersen, Daniel Nyarko (Birgir Rasmussen, 33.), Olivur Abrahamsen - Allan Poulsen (Hallur Christiansen, 80.), Emmanuel Larbi
***Gult kort:*** Búi Mortensen, Predrag Zivkovic
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig — Ólavur Poulsen, Egil á Bø, Fróði Clementsen, Jóhan á Stongum (Andrzej Pacek, 46.) — Bárður Olsen, Marni Djurhuus, Gert Hansen (Knút Vesturtún, 75.), Hans Pauli Samuelsen — Sonni L. Petersen (Leif Niclassen, 75.), Sorin Angel
***Gult kort:*** Hans Pauli Samuelsen, Sorin Angel, Fróði Clementsen.
**Dómari:** Eiler Rasmussen